# Ungi leirvíkingurin dømir oftast

*Í teimum 45 dystunum, sum vórðu leiktir í fyrru kappingarhálvu, vórðu nýtir 10 dómarar. Av hesum var leirvíkingurin, Petur Reinert, tann, sum dømdi flestar dystir*

Tíggju dómarar hava hildið skil á teimum 45 landskappingadystunum higartil. Tólv „menn í svørtum“ dømdu í landskappingini-99, men fýra teirra eru ikki at síggja á vøllinum í ár. Teir eru havnarmaðurin Sjúrður Norðbúð, hvalvíkingurin Bergur Magnussen, sumbingurin Petur Erhard Kjærbo og gøtumaðurin Tummas Pauli Olsen.

Lars Múller, ið sjálvur verjir málið hjá Royn í 2.deild, dømdi sín allarfyrsta 1.deildardyst (B71-FS Vágar) í ár, og so byrjaði tann 22-ára leirvíkingurin Petur Hansen at døma aftur eftir at hann hevði verið burtur í 1999. Hansara navni, javnaldri og býgdarmaður, Petur Reinert, er tann, ið hevur dømt flestar landskappingardystir higartil. Petur Reinert debuteraði í 1.deild í fjør í málleysa dystinum á Toftum millum B68 og VB (15.umfar), og í 2000 telist hann longu millum størstu dómaraálitini í landinum. Ungi leirvikingurin hevur nevnliga dømt sjey dystir í ár, og tveir teirra í einum og sama umfari (9., HB-Sumba og VB-B36). Ronumndir menn sum Lassin Isaksen, Niklas á Líðarenda og Birgir Sondum hava bara verið við í seks dystum í part. LÍF er eisini einasta felagið, ið umboðar tveir 1.deildardómarar í ár (í fjør vóru tað tey bæði B36 og GÍ).

Annar er rættiliga merkisvert, at heimalið fingu nógv fleiri kort, enn útilið - 70 ómóti 58 hjá gestunum. Leikarar av útiliðum vóru tó oftari riknir av vøllinum, níggju ímóti sjey hjá heimaliðum. Heimalið fingu 98 sektarstig, meðan útilið fingu 94 sektarstig.

Í fjør fingu leikarar 256 gul og 31 reyð kort í 1.deild. Tað merkir, at dómarar eru hvørki blivnir strangari ella linari í ár. Í fyrru helvt av kappingini-2000 fingu leikarar 128 gul (akkurat tað sama í miðal samanborið við 1999) og 16 reyð kort.

IE



*Fyrstu níggju dystirnar av kappingarárinum, var Petur Reinert tann dómarin, sum dømdi flestar dystirnar*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

| dómari | ár | felag | dystir | gul h/ú | reyð h/ú | kort g/r |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Petur REINERT | 22 | LÍF | 7 | 17-10 | 0-1 | 27-1 |
| Lassin ISAKSEN | 39 | KÍ | 6 | 11-7 | 1-1 | 18-2 |
| Niklas á LÍÐARENDA | 44 | GÍ | 6 | 7-9 | 3-1 | 16-4 |
| Birgir SONDUM | 38 | B36 | 6 | 3-5 | 0-0 | 8-0 |
| Jens P. BRATTALÍD | 35 | VB | 5 | 9-7 | 1-1 | 16-2 |
| Suni JOHANSEN | 39 | SÍF | 5 | 7-7 | 1-2 | 14-3 |
| Oddmar ANDREASEN | 40 | HB | 4 | 10-5 | 1-2 | 15-3 |
| Kim EJDESGAARD | 45 | Fram | 3 | 2-4 | 0-1 | 6-1 |
| Petur HANSEN | 22 | LÍF | 2 | 3-3 | 0-0 | 6-0 |
| Lars MÚLLER | 26 | Royn | 1 | 1-1 | 0-0 | 2-0 |
| **Í alt** | | | 45 | 70-58 | 7-9 | 128-16 |

**Mest sektaðu leikarar fyrru hálvu 2000**

| Leikari | Felag | Gul | Reyð | stig |
|---|---|---|---|---|
| Janus Kjærbo | VB | 3 | 1 | 7 |
| Eli Hentze | B71 | 2 | 1 | 6 |
| Jákup á Borg | B36 | 1 | 1 | 5 |
| Herbert í Lon Jacobsen | B36 | 1 | 1 | 5 |
| Jógvan Jón Petersen | B71 | 1 | 1 | 5 |
| Súni Olsen | GÍ | 1 | 1 | 5 |
| Helgi L. Petersen | GÍ | 1 | 1 | 5 |
| Hans á Lag | HB | 1 | 1 | 5 |
| Niclas Niclasen | KÍ | 1 | 1 | 5 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 1 | 1 | 5 |
| Hallur Dam Joensen | Sum. | 1 | 1 | 5 |
| Mortan úr Hørg | Sum. | 1 | 1 | 5 |
| Eirikur Joensen | Sum. | 1 | 1 | 5 |
| Magni Jarnskor | GÍ | 4 | 0 | 4 |
| Jan Petersen | B68 | 0 | 1 | 4 |
| Bergleif Sólsker | GÍ | 0 | 1 | 4 |
| Andrzej Pacek | KÍ | 0 | 1 | 4 |
| Bjarni Prior | B36 | 3 | 0 | 3 |
| Ronnie Samuelsen | B36 | 3 | 0 | 3 |
| Hans Jørgen Djurhuus | B71 | 3 | 0 | 3 |
| John Johansen | FSV | 3 | 0 | 3 |
| Zilvanius Zudis | FSV | 3 | 0 | 3 |
| Jan Andreasen | KÍ | 3 | 0 | 3 |
| Ove Nysted | KÍ | 3 | 0 | 3 |
| Kári Hansen | NSÍ | 3 | 0 | 3 |
| Jan Poulsen | Sum. | 3 | 0 | 3 |
| Pedrag Zivkovic | VB | 3 | 0 | 3 |

Tríggir leikarar úr GÍ og Sumba fingu reyð kort í fyrru helvt av kappigini-2000, meðan uppflytararnir úr FS Vágum er einasta felagið, ið megnaði at sleppa undan útvísningum av sínum spælarum

# Birgir er ikki so strangur longur

*Higartil í ár hevur Birgir verið fittasti dómarin í landinum. Bert átta gul kort hevur hann givið í seks dystum*

Í 1998 var Birgir Sondum tann strangasti dómarin í 1.deild. Men í ár er støðan heilt øvug - havnamaðurin hevur bara givið átta gul og eingi reyð kort í teimum seks dystunum, hann dømdi, og sostatt er Birgir nógv tann linasti av øllum 1.deildardómarum í 2000. Í fjør gav ein annar havnarmaður, Kim Ejdesgaard, flest kort í 1.deild. Hesaferð er heldur ikki hann ikki so ræðandi fyri leikararnar.

Á „toppinum“ finna vit tann triðja havnarmannin, Oddmar Andreasen. Hann hevur bara dømt fýra ferðir í ár, og umframt 15 gul kort vísti Oddmar trimum leikarum út av vøllinum. Tveir teirra fingu boðini í tí umstrídda dystinum í Klaksvík millum KÍ og B68. Ein dystur, sum mest verður mintur fyri hendingarnar í hálvleiksstøðginum og eftir dystin, og sum eisini mundi viðført dómaraverkjfall fyrst í hesum mánaðinum.

Í miðal fyri hvørt dómaraavrikið gav Oddmar Andreasen flestu kort. Um gula kortið er eitt sektarstig og tað reyða kortið fýra, so býtti Oddmar í miðal 6,75 sektarstig út hvørja ferð, hann dømdi.

IE

| Navn | Dystir | Gul | Reyð | Stig | Í miðal |
|---|---|---|---|---|---|
| Oddmar ANDREASEN | 4 | 15 | 3 | 27 | 6,75 |
| Niklas á LÍÐARENDA | 6 | 16 | 4 | 32 | 5,33 |
| Suni JOHANSEN | 5 | 14 | 3 | 26 | 5,20 |
| Jens Petur BRATTALÍD | 5 | 16 | 2 | 24 | 4,80 |
| Petur REINERT | 7 | 27 | 1 | 31 | 4,43 |
| Lassin ISAKSEN | 6 | 18 | 2 | 26 | 4,33 |
| Kim EJDESGAARD | 3 | 6 | 1 | 10 | 3,33 |
| Petur HANSEN | 2 | 6 | 0 | 6 | 3,00 |
| Lars MÚLLER | 1 | 2 | 0 | 2 | 2,00 |
| Birgir SONDUM | 6 | 8 | 0 | 8 | 1,33 |



# VB otar seg longur upp

*Sigurin á Sumba, saman við stigamissinum hjá nærmastu kappingarneytunum viðførdi, at VB nú er einsamalt á silvurplássinum*



*Eingin ivi var um, hvat var betra liðið í jóansøkudystinum*

**Mynd: Áki Bertholdsen**

JÁKUP MØRK

VB-Sumba 3-0 (3-0)

Orsakað av jóansøkuni, var dysturin millum VB og Sumba framskundaður til leygardag.

Undan dystinum boðaðu vágbingar frá, at teir ætlaðu sær at gera sítt, soleiðis at stevnuhýrurin skuldi vera varåveittur út á kvøldið, og eftir trygga sigurin á Sumba kann helst eisini staðfestast, at so varð.

### Gjørdu skjótt av

Tó so, einki er at ivast í, at fleiri av áskoðarunum als ikki fingu við, hvussu VB gjørdi av við grannarnar, tí tað gingu ikki meira enn 23 minuttir, áðrenn dysturin í roynd og veru varð avgjørdur.

Longu í fyrsta álopinum vóru sumbingar um reppi at gera sjálvmál, og støðuga VB trýstið helt sær, til dómarin hevði bríkslað fyrstu trý korterini av.

Álopini skolaðu oman móti sumbiarmálinum frá fyrsta bríksli, og eftir níggju minuttir gav hetta úrslit fyri fyrstu ferð. Robert Cieslewicz fót ígjøgnum í høgra borði, og tá bólturin varð sendir inn fyri, var leikandi venjarin, Krzystof Popzynzki hægstur og stútaði bóltin í málið.

Sutta løtu seinni var aftur galið í sumbiarverjuni. Í fyrstu atløgu fekst bólturin eitt sindur út frá, men á brotsteigarmarkinum tók Michael í Lágabø bóltin niður við bringuni, og við einum vøkrum skoti tryggjaði hann sær fyrsta fyrstudeildarmálið.

Nakað seinni kundi Robert senda bóltin í netið til 3-0, tá hann var fyrstur á einum innleggi, og so var av álvara líkt til, at Sumba enn einaferð skuldi verða kanónføi hjá einum oddaliði.

So galið gekk tað tó ikki, men við eitt sindur størri neyvleika, kundi VB havt skotið sumbingarnar niður og norð, ella skuldi man kanska sagt suður.

### Tóku tað róligt

Seinna umfarið legði VB eitt sindur varligari fyri. Leikararnir vóru so at siga vísir um, at sigurin longu var fingin til høldar, og tí løgdu teir nú størri dent á at verja trý mála leiðsluna.

Var talan um nakra yvirvág seinastu trý korterini, vóru tað kanska sumbingar, sum áttu hesa, men rættuliga í vanda kom sigurin hjá vágbingum ongantíð, og tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð, kundu teir saman við mongu áskoðarunum frøast um enn trý stig til tunga stigaposan.

### Lagaði seg eftir vild

Tá vistu áskoðararnir av, at toftamenn høvdu tapt móti FS Vágum, men hinvegin vistu teir ikki, hvussu úrslitini fóru at laga seg sunnudagin.

Alt hetta var tó greitt, tá vit sunnudagin tosaðu við Jón Paula Olsen, og hann kundi bara ásanna, at har var alt gingið eftir vild í so máta.

Tað skerst tó ikki burtur, at teir í Vági framvegis iðra seg um, at teir í øðrum umfarinum av landskappingini tapti heimadystin móti B71, hóast flest øll vóru samd um, at VB hevði fult uppiborið at vunnið tann dystin.

Higartil er hetta einasta ferðin, at vágbingar eru farnir stigaleysir av vøllinum, og tá fjarstøðan upp til HB júst er 3 stig, er einki at siga til, at teir gremja seg um stigamissin í tí dystinum.

Hetta mugu vágbingar tó leggja aftur um bak, og ístaðin gera sítt til, at seinna helvt av landskappingini kann gerast eins góð og fyrra.

### Royndirnar munnu koma

Vágbingar hava ikki nakrar altjóða uppgávur at hugsa um hetta kappingarárið, men hetta merkir tó ikki, at teir ætla sær at taka sær av løttum í summarsteðginum.

Jón Pauli greiðir frá, at teir um hálvan juli mánað fara til Danmarkar á venjingarlegu, haðani teir koma heim aftur fyrst í august mánaði.

Leikarahópurin verður lítið og einki broyttur í mun til fyrru kappingarhálvu. Janus Kjærbo fer av landinum í útbúgvingarørindum, men hinvegin hevur VB fingið Jón Gærdbo við aftur seinastu dystirnar, so alt í alt verðru talan á leið um sama leikarahóp, sum tað hevur verið fyrru hálvu av kappingarárinum.

Um hetta er nóg mikið til at vinna seg enn longur upp á stigatalvuni er sjálvandi óvist, men við at hyggja at dystarskránni sæst, at VB í øllum førum skuldi havt góðar fortreytir fyri at enda heilt ovarlga, tá avtornar.

Teir hava longu verið í Havn einaferð, umframt at klaksvíkingar og toftamenn eisini hava tikið ímóti teimum, so undir øllum umstøðum er líkt til, at Eiðið fer at leggja graslíki til fleiri av teimum dystum, sum fara at hava alstóra ávirkan á endaligu støðuna.

Størsti spurningurin tykist kanska vera, um vágbingarnir hava tað støðufesti, sum krevst, um liðið skal gera seg galdandi í oddastríðnum.

Mangan verður tikið til, at siðvenjan hevur ein stóran týdning í hesum sambandi, og her eru vábingar eftirbátar í mun til hini oddaliðini. Flestu av leikarunum hjá HB, B36, B68 og KÍ hava roynt at verið føroyameistarar, og vita, hvat krevst í slíkum dystum.

Tær royndirnar eru tað fáir á VB liðnum, sum hava, og hetta kann verða ein bági, men hinvegin kann eisini verða, at leikararnir havahesar royndir, tá farið verður undir komandi kappingarár.

**VB-Sumba 3-0 (3-0)**

1-0: Krzystof Popczynzki 9.
2-0: Michael í Lágabø 17.
3-0: Robert Cieslewicz 23.

Dómari: Kim Ejdesgaard

# Summarfótbóltur í Hvalba

2. deild: Royn–TB 1–1 (1–1)

Tvørámenn hava nógv ríkari fótbóltssøgu, enn hvalbingar hava. TB hevur verið í fremstu deildini tey flestu árini, síðani tað í 1942 var farið undir skipaða FM kapping, og teir hava vunnið FM fleiri ferðir. Hvalbingar hava okkurt árið verið í nánd av uppflyting til bestu deildina, men sum oftast hava teir verið í 2. deild, og onkuntíð hava teir verið í 3. deild.

Nú er minni munurin á liðunum báðum norðarlaga í Suðuroy. Bæði eru í 2. deild. TB hevur ikki megnað at hildið seg í bestu deildini, og Royn hevur megnað at hildið seg í 2. deild. Hvørki liðið hevur verið serliga sannførandi í ár. Royn skal eftir summarsteðgin fyrst útivølli móti HB.

og fremst hugsa um at halda seg burtur frá niðurflytingini. Tað verður ein ivaleysa stór uppgáva fyri teir.

TB vil fegið vera har, sum tað verður gjørt av, hvør skal flyta beinleiðis upp í 1. deild, men tað verður strevið hjá tvørámonnum.

Grannarnir gjørdu fyrru hálvu burturav sær fríggjakvøldið, áðrenn teir fóru á jóansøku. Tað var sera friðarligt, og úrslitið var 1–1. Birgir Jørgensen, sum ikki gjørdi serliga nógv um seg í 1. deild, hevur verið sannur fongur hjá hvalbingum. Hann legði Royn á odda í 1. hálvleiki. Tvørámenn javnaðu undan hvíldini. Málskjútti var evnaríki Hallur Christiansen, sum næstsíðsta vikuskifti spældi í 3. deild.

Tvørámenn søgdu fríggjakvøldið farvæl við Óla Johannesen, sum nú fer aftur til Århus, har hann skal stríðast fyri at vinna sær pláss á besta liðnum. Tað verður spennandi at fylgja við í, hvussu tað fer at hilnast. Bæði hjá Óla Johannesen og hjá TB. Tað er einki at taka seg aftur í, at landsliðsmaðurin hevur verið stórur íblástur fyri barndómsfelagið hesar vikurnar, hann hevur verið á Tvøroyri. Nú mugu teir klára seg í stríðnum um uppflyting uttan hann. Tað verður sera strevið.

Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin fær TB vitjan av teimum næstbestu gøtumonnunum. Hvalbingar skulu 5. august norður til Eiðis at spæla móti oddaliðnum EB/Streymi. jh

JH

# EB/Streymur hevur rætta stevið

2. deild: EB/Streymur–NSÍ 6–0 (1–0)

Tað gekk striltið at fáa glið á, men tá teir av álvara komu framum gekk skjótt. Tað er um EB/Streym, sum vit hugsa. Teir høvdu leygardagin vitjan av teimum næstbestu hjá NSÍ. Talan var um oddauppgerð, og munurin í 1. hálvleiki var ikki so stórur. Tá fekk EB/Streymur eitt mál, og tað skoraði Andreas Dahl.

Í 2. hálvleiki gekk undan hjá heimaliðnum á Mølini á Eiði, og tað var serliga Jón Sigurd Gleðisheygg, sum var í rætta essinum. Fyrrverandi GÍ miðverjin hevur verið álopsmaður hjá EB/Streymi í ár, og har hevur hann víst, at tað sannliga er dugur í honum í i ódini.

Jón Sigurd økti tíðliga í 2. hálvleiki til 2–0. Halltórur Joensen og Knút Vesturtún øktu til 4–0, og so var Jón Sigurd aftur tvær ferðir upp á spæl.

Stórsigurin hjá EB/Streymi hevur við sær, at teir í summarfrítíðini liggja heilt væl fyri í kappingini um at flyta upp í bestu deildina. Men venjarin, Bergur Magnussen, vil framvegis einki hoyra um uppflyting. Hann tekur ein dyst í senn, og so fæst at síggja, hvussu úrtøkan verður sammett við hini liðini, tøa síðsta umfarið er avgreitt 30. september.

Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin skal EB/Streymur spæla á heimavølli móti Royn. Á pappírinm sær tað út til at vera ein uppgáva av tí lættara slagnum, men so stutt eftir summarsteðgin er tað altíð ein spurningur, hvussu liðijni eru fyri.

NSÌ hevur staðið seg stak væl higartil í kappingini. Teirra setningur er fyrst og fremst at syrgja fyri, at teir halda eykamonnunum hjá besta liðnum á so høgum støði, sum tað ber til. Higartil hevur tað eydnast væl. Plássið í næstbestu deildini tykist vera bjargað í ár 2001. Men sjálvsagt er tað hugaligari at spæla um heiðursmerkini, enn tað er at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting.

Tá tað hevur gingið illa í 1. deild, hevur tað gingið væl í 2. deild hjá NSÍ. Hesa ferð gekk illa í 2. deild, men so gekk tað væl í 1. deild. Tað kunnu teir í NSÍ ivaleyst liva heilt væl við!

Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin skulu ungu menninir hjá NSÍ spæla á